TRYGD

# Hálvársfrásøgn 2023

Interim Report
H1 2023



TRYGD

# **Innihaldsyvirlit /** Contents

Gongdin seinastu 5 árini / 5-year financial highlights ..... 2
Frágreiðing um fyrra hálvár 2023 ..... 3
Eginpeningur og solvensur hjá felagnum ..... 4
Útlit fyri seinna hálvár 2023 ..... 4
Aðrar upplýsingar ..... 5
English Summary H1 2023 ..... 6
Rakstrarroknskapur / Income statement ..... 7
Fíggjarstøða / Balance sheet ..... 8
Uppgerð av broyting í eginogn / Statement of changes in equity ..... 10
Notur / Notes ..... 11
Nota 1: Nýttur roknskaparháttur ..... 11
Grannskoðan og gjøgnumgongd ..... 11
Note 1: Basis of preparation of the H1 financial statements ..... 11
Audit and review ..... 11
Leiðsluátekning ..... 12
Statement by the management ..... 12

TRYGD

# Gongdin seinastu 5 árini / 5-year financial highlights

| DKK 1.000 | 30.06.2023 | 30.06.2022 | 30.06.2021 | 30.06.2020 | 30.06.2019 | 31.12.2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstur/Income Statement** | | | | | | |
| Tryggingargjøld brutto / Gross premiums earned | 79.656 | 75.616 | 69.063 | 65.242 | 60.741 | 155.449 |
| Bruttoskaðaendurgjøld / Gross insurance claims | -52.010 | -48.032 | -47.784 | -50.642 | -36.743 | -101.830 |
| Rakstrarútreiðslur av tryggingarvirksemi / Total insurance operating expenses | -14.376 | -12.945 | -12.701 | -12.753 | -13.043 | -25.422 |
| Úrslit av endurtrygging / Profit/loss on business ceded | -9.540 | -6.096 | -4.241 | -1.170 | -3.348 | -9.936 |
| Tryggingarteknisk renta f.e.r. / Technical interest, net of reinsurance | 1.439 | 156 | -56 | -40 | -97 | 967 |
| **Tryggingartekniskt úrslit / Technical result** | **5.169** | **8.699** | **4.282** | **636** | **7.510** | **19.229** |
| Íløguavkast eftir tryggingartekniska rentu / Investment yield after tech. interest rate income | 403 | -4.317 | -747 | -483 | -205 | -4.029 |
| **Úrslit / Net profit** | **4.569** | **3.607** | **2.890** | **147** | **5.990** | **12.452** |
| Úrslit av endurgjaldsavsetingum fyri egna rokning / Run-off result from net claims provisions | -3.548 | -2.065 | -1.804 | -2.120 | 1.784 | -3.456 |
| **Fíggjarstøða / Balance sheet** | | | | | | |
| Avsetingar til tryggingaravtalur í alt/ Total technical provisions | 148.090 | 132.756 | 132.756 | 112.668 | 103.379 | 115.064 |
| Tryggingaráogn tilsamans / Total Technical assets | 2.999 | 3.326 | 3.326 | 5.065 | 3.455 | 2.634 |
| Eginogn tilsamans / Total Equity | 71.325 | 59.410 | 58.693 | 91.406 | 82.019 | 68.255 |
| Áogn tilsamans / Total Assets | 232.643 | 199.920 | 199.920 | 213.442 | 194.502 | 194.398 |
| **Lyklatøl / Ratios** | | | | | | |
| Bruttoendurgjaldsprosent / Claim ratio | 65,3 | 63,5 | 69,2 | 77,6 | 60,5 | 65,5 |
| Bruttokostnaðarprosent / Gross expense ratio | 18,0 | 17,1 | 18,4 | 19,5 | 21,5 | 16,4 |
| Nettoendurtryggingarprosent / Net reinsurance ratio | 12,0 | 8,1 | 6,1 | 1,8 | 5,5 | 6,4 |
| Combined Ratio / Combined Ratio | 95,3 | 88,7 | 93,7 | 99,0 | 87,5 | 88,3 |
| Operating Ratio / Operating Ratio | 91,9 | 88,3 | 93,9 | 99,1 | 87,8 | 87,7 |
| Lutfalsligt úrslit av endurgjaldsavsetingum/ Relative Run-off gains/losses | -6,2 | -4,6 | -4,2 | -4,4 | 4,1 | -6,3 |
| Eginognsavkast í prosentum / Return on Equity | 7,0 | 6,0 | 3,6 | 0,2 | 7,7 | 20,1 |

Yvirlit yvir gongdina seinastu fimm árini er gjørt sambært kunngerð nr. 4 frá 27. juni 2018 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum. Við virknaði frá 1. januar 2019 er nýggja kunngerðin sett í gildi.

The Five Year Summary is rendered in accordance with Executive order No. 4 from 27th of June 2018 on annual reports for insurance companies and financial holding companies. The new Executive order came into effect on 1 January 2019.

## Frágreiðing um fyrra hálvár 2023

Fyrra hálvár í 2023 hevur yvirskipað gingið væl. Tryggingarinntøkurnar hava verið lutfalsliga høgar, vit hava aftur sæð ein vøkstur í inntøkunum, og skaðarnir hava verið á einum støði, sum er eitt sindur hægri enn tað vanliga. Stormurin sum rakti Føroyar í februar hevði nógvar skaðar við sær og hevur merkt skaðagongdina neiliga. Hinvegin hevur gongdin á fíggjarmarknaðinum verið meira vanlig í mun til sera vánaliga árið í fjør.

Úrslitið eftir skatt gjørdist 4,6 mió. kr., sum er lægri enn væntað, men tó hægri enn sama tíðarskeið í fjør. Til samanberingar var úrslitið 3,6 mió. kr. eftir skatt fyrra hálvár í 2022.

Tryggingartekniska úrslitið gjørdist 5,2 mió. kr. samanborið við 8,7 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør.

Bruttotryggingargjøldini hjá Trygd hava verið støðugt vaksandi seinastu árini. Samanborið við sama tíðarskeið í fjør eru tey hækkaði við 8,6 mió. kr., og tey eru nú 103,7 mió. kr. samanborið við 95,1 mió. kr. fyrra hálvár í 2022.

### Útreiðslurnar hjá felagnum

Útreiðslurnar í sambandi við skaðar vóru hægri fyrra hálvár í ár, enn fyrra hálvár í fjør. Vøksturin í útreiðslum, sum er meira enn vøksturin í inntøkunum, kemur serstakliga frá stormskaðum í byrjanini av árinum. Skaðaendurgjøld hjá Trygd vóru 51,2 mió. kr. samanborið við 47,3 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør. Harafturat er vert at nevna, at eins og alt annað, ið er dýrkað nógv seinastu tvey árini, er tað vorðið dýrari at gera skaðar aftur, og hetta hevur sjálvsagt ávirkað hækkandi skaðaendurgjøldini.

Hyggja vit eftir bruttoendurgjaldsprosentinum fyri fyrra hálvár 2023, er tað eitt sindur lægri enn sama tíðarskeið í fjør. Fyrra hálvár var tað 65,3%, meðan tað var 63,5% sama tíðarskeið í fjør.

### Avlop á íløguvirkseminum

Íløguvirksemið fyrra hálvár í ár hevur givið eitt lítið avlop á 0,4 mió. kr. samanborið við 4,3 mió. kr. í halli sama tíðarskeið í fjør. Meginparturin av íløgufænum er sett í lánsbrøv við sera góðari flokking, sum ikki gevur stórt avkast.

### Sum heild nøktandi úrslit

Rakstrarkostnaðurin í fyrra hálvári samsvaraði við væntanirnar og er á einum hægri støði, enn sama tíðarskeið í fjør. Tá ið havt verður í huga, at virksemið hjá Trygd er vaksandi, er hetta eitt tekin um, at fyritøkan áhaldandi gerst meira effektiv og hevur fyri eyga at halda tamarhald á kostnaðunum.

Endurtryggingarskipanin, sum Trygd hevur lagt seg eftir, lagar seg støðugt eftir tilgongdini av kundum og hækkandi virðum, umframt at minka um ógvusligu árinini av fleiri stórum skaðahendingum. Vavið av stormskaðum søguliga sæð hevur við sær støðugt hægri kostnaðir til henda partin av virkseminum, sum er munandi dýrari enn í sama tíðarskeið í fjør.

Til samans hevur Trygd rentað eginpeningin við 7,0% fyrra hálvár 2023.

Leiðslan metir úrslitið vera nøktandi, tá ið hædd verður tikin fyri, at serliga neilig ávirkan var av nógvum stormskaðum í byrjanini av árinum. Leiðslan fegnast um, at Trygd, síðani tað var stovnað í 1998, áhaldandi tryggjar kapping á føroyska tryggingarmarknaðinum. Harafturat er felagið áhaldandi ein virkin leikari í menningini av nýggjum tilboðum til føroyskar kundar, og er bæði sterkt og ført fyri at hjálpa kundunum, tá ið tørvur er á tí.

## Eginpeningur og solvensur hjá felagnum

Tann 30. juni 2023 var eginognin hjá felagnum 71,3 mió. kr. P/F BankNordik eigur partapeningin, ið er 40,0 mió. kr.

Trygd hevur gjøgnum fyrra hálvár 2023 latið inn uppgerðir um individuellan solvens til Tryggingareftirlitið. Uppgerðin um individuellan solvens, ið er neyðugur í sambandi við virksemið hjá felagnum, er nakað lægri enn bókaða eginognin.

Individuella solvenskravið tann 30.06.2023 var 47,8 mió. kr., meðan kapitalgrundarlagið til at lúka solvenskrøvini var 70,2 mió. kr. Hetta vísir, at solvensurin er lutfalsliga góður og á einum støði, ið leiðslan er nøgd við.

Solvensdekningurin tann 30.06.2023 var 1,47. Niðanfyri sæst solvensdekningurin árini 2019-2023.

| | 30.06.2023 | 30.06.2022 | 30.06.2021 | 30.06.2020 | 30.06.2019 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Solvensdekningur** | 1,47 | 1,37 | 1,60 | 2,11 | 1,54 |

Solvensurin er gjørdur upp eftir sonevndu “Solvens II”-reglunum frá 2018.

## Útlit fyri seinna hálvár 2023

Leiðslan væntar, at í komandi hálvári fara vit at síggja framhaldandi hækkandi inntøkur, men samstundis eisini fleiri skaðar. Vandin fyri stormum er altíð størri um veturin, og hetta kann sostatt ávirka virksemið hjá felagnum komandi tíðina. Harafturat kunnu arbeiðsskaðar taka drúgva tíð at viðgera, og tí kunnu slíkir gamlir skaðar eisini hava ávirkan á úrslitið hjá felagnum.

Úrslitið fyri restina av árinum verður í stóran mun ávirkað av gongdini á tryggingarmarknaðinum, har kappingin um kundarnar framhaldandi er hørð. Umframt tað kunnu einstakir stórir skaðar henda – serliga arbeiðsskaðar og stormskaðar – ið sjálvsagt ávirka úrslitið hjá felagnum. Vit hava eisini sæð, at fíggjarmarknaðurin kann vera óstøðugur eins og í 2022, og tað kann helst eisini seta sín dám á gongdina.

Leiðslan væntar, at árið endar við einum úrsliti millum 10 – 18 mió. kr. áðrenn skatt.

## Aðrar upplýsingar

Tað eru ongar nevningarverdar hendingar farnar fram síðan 30. juni 2023, sum hava avgerandi ávirkan á raksturin og fíggjarligu støðuna hjá felagnum.

## English Summary H1 2023

During the first half of 2023, the financial performance of the company has been largely positive. The insurance revenues have seen a proportional increase, marking a growth in income. However, claims have been somewhat higher than usual due to the storm that hit Faroe Islands in February, significantly affecting the claim expenses.

The after-tax result amounted to 4.6 million kr., which is lower than expected but an improvement from 3.6 million kr. in the same period of 2022. The insurance technical result reached 5.2 million kr., compared to 8.7 million kr. in the previous year. Gross insurance income has consistently grown in recent years, with an increase of 8.6 million kr., reaching 103.7 million kr., compared to 95.1 million kr. in the first half of 2022.

Expenses related to claims have been higher this half-year compared to the same period in 2022, with an increase driven primarily by storm claims at the beginning of the year. Claim expenses reached 51.2 million kr., up from 47.3 million kr. the previous year. The gross claims ratio for the first half of 2023 was slightly higher at 65.3%, compared to 63.5% for the same period in 2022.

Investment activity yielded a modest return of 0.4 million kr., a significant improvement from a loss of 4.3 million kr. during the same period in 2022. Most of the investments were in high-quality bonds, which do not offer high returns.

Operational expenses for the first half matched expectations and are higher than the previous year. Taking into account the company's growth, this indicates increasing efficiency and a continuous effort to control costs.

As of June 30, 2023, the company's equity stood at 71.3 million kr., with P/F BankNordik owning 40.0 million kr. The solvency, as calculated according to the "Solvency II" rules from 2018, showed a solvency ratio of 1.47, demonstrating a solid financial position.

| | 30.06.2023 | 30.06.2022 | 30.06.2021 | 30.06.2020 | 30.06.2019 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Solvency Ratio** | 1,47 | 1,37 | 1,60 | 2,11 | 1,54 |

Looking ahead to the second half of 2023, the leadership expects rising revenues but also increased claims. Risks from winter storms can impact the company's performance. Furthermore, previous workers' compensation claims can influence the results. The outcome will also be influenced by market competition and the potential for large claims, especially from workers' compensation and storm claims. Financial markets can also be volatile, as seen in 2022. The company anticipates a year-end pre-tax result ranging between 10 and 18 million kr.

There have been no events of great importance after June 30, 2023, that would significantly impact the company's operations or financial position.

TRYGD

## Rakstrarroknskapur / Income statement

| DKK 1.000 | 30.06.2023 | 30.06.2022 |
|---|---|---|
| Tryggingargjøld brutto / Gross premiums written | 103.652 | 95.085 |
| Endurtryggingargjøld / Ceded insurance premiums | -10.758 | -6.565 |
| Broyting í avsettum tryggingargjøldum / Change in gross provisions for unearned premiums | -23.996 | -19.469 |
| Broyting í endurtryggjaranna parti av avsettum tryggingargjøldum / Change in reinsurers' share of provisions for unearned premiums | 232 | -431 |
| **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt / Earned premiums, net of reinsurance** | **69.130** | **68.620** |
| **Renta av tryggingarvirksemi / Technical interest, net of reinsurance** | **1.439** | **156** |
| Útgoldnar veitingar/ Claims paid | -43.921 | -47.127 |
| Endurgoldið frá endurtryggingum / Reinsurance recoveries | 653 | 1.626 |
| Broyting í avsetingum til endurgjøld / Change in gross provisions for claims | -7.977 | -964 |
| Broyting í váðaíkasti / Change in Risk margin | -111 | 58 |
| Broyting í endurtryggingarparti av avsetingum til endurgjøld / Change in reinsurers' share of gross provisions for claims | 133 | -888 |
| **Skaðaendurgjøld fyri egna rokning í alt / Claims incurred, net of reinsurance** | **-51.224** | **-47.295** |
| Útveganarkostnaðir/ Acquisition costs | -11.309 | -10.182 |
| Fyrisitingarkostnaðir / Administrative expenses | -3.067 | -2.763 |
| Provisiónir og partar av úrslitum frá endurtryggjarum / Commission from reinsurers | 200 | 164 |
| **Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi fyri egna rokning í alt / Total insurance operating expenses, net of reinsurance** | **-14.176** | **-12.782** |
| **Tryggingartekniskt úrslit / Technical result** | **5.169** | **8.699** |
| Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. / Interest income and dividends, etc. | 1.052 | 669 |
| Virðisjavningar / Value adjustments of investment assets | 776 | -4.684 |
| Rentuútreiðslur / Interest expenses | -2 | -67 |
| Fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi / Administration cost related to investment activity | -90 | -80 |
| **Úrslit av íløguvirksemi í alt / Total return on investments** | **1.736** | **-4.161** |
| Renta og virðisjavning av tryggingartekniskum avsetingum / Interest and value adjustments of provisions | -1.333 | -156 |
| **Úrslit av íløguvirksemi aftan á rentu og virðisjavning av tryggingartekniskum avsetingum/ Return on investment activities** | **403** | **-4.317** |
| **Úrslit áðrenn skatt / Profit before tax** | **5.572** | **4.382** |
| Skattur / Tax | -1.003 | -774 |
| **Hálvársúrslit / Profit for the period** | **4.569** | **3.607** |

TRYGD

## Fíggjarstøða / Balance sheet

| DKK 1.000 | 30.06.2023 | 30.06.2022 |
|---|---|---|
| **Ogn** / Assets | | |
| Rakstrargøgn / Operating equipment | 630 | 628 |
| Bygningar til egna nýtslu/ Real property | 2.575 | 2.603 |
| **Materiell ogn í alt / Total tangible assets** | **3.205** | **3.231** |
| | | |
| Lánsbrøv / Bonds | 145.948 | 160.873 |
| Íløguprógv / Investment funds | 60.471 | 18.841 |
| **Íløguogn í alt/ Investment assets** | **206.419** | **179.715** |
| | | |
| Endurtryggjaranna partur av avsettum tryggingargjøldum/ Reinsurers' share of provisions for unearned premiums. | 235 | 217 |
| Endurtryggjaranna partur av avsetingum til endurgjøld / Reinsurers' share of provisions for unpaid claims. | 2.764 | 3.109 |
| **Endurtryggjaranna partur av avsetingum til tryggingaravtalur í alt / Total reinsurer's share of provisions for insurance contracts** | **2.999** | **3.326** |
| | | |
| Áogn hjá tryggingartakarum / Receivables from policyholders | 4.920 | 4.656 |
| **Áogn í samband við beinleiðis tryggingaravtalur í alt / Total receivables in connection with direct insurance contracts** | **4.920** | **4.656** |
| | | |
| Áogn hjá tryggingarfeløgum / Receivables from insurance companies | 528 | 1.365 |
| **Áogn í alt / Total receivables** | **8.447** | **9.347** |
| | | |
| Útsett skattaogn / Deffered tax surplus | 151 | 153 |
| Tøkur peningur / Cash and cash equivalents | 12.421 | 5.494 |
| **Onnur ogn í alt/ Other assets** | **12.572** | **5.647** |
| | | |
| Rentur tilgóðar og innvunnin leiga / Outstanding interest and rent | 832 | 761 |
| Aðrar tíðarmarkinger / Other prepayments and accrued income | 1.167 | 1.220 |
| **Tíðaravmarkingar í alt/ Total accrued income** | **2.000** | **1.981** |
| | | |
| **Ogn í alt / Total assets** | **232.643** | **199.920** |

| Nota | DKK 1.000 | 30.06.2023 | 30.06.2022 |
|---|---|---|---|
| | **Skyldur / Equity and liabilities** | | |
| | Partapeningur ella ábyrgdarpeningur / Share capital | 40.000 | 40.000 |
| | Aðrar burturleggingar / Reserve Equity fund | 615 | 615 |
| | Framflutt úrslit / Retained earnings | 30.710 | 18.795 |
| | **Eginogn í alt / Equity** | **71.325** | **59.410** |
| | Avsett til tryggingargjøld / Gross provisions for unearned premiums | 74.699 | 67.879 |
| | Avsett til endurgjøld / Gross provisions for claims | 68.747 | 60.268 |
| | Váðaískoyti á skaðatryggingaravtalum / Risk margin | 4.645 | 4.610 |
| | **Avsetingar til tryggingaravtalur í alt / Total technical provisions** | **148.090** | **132.756** |
| | **Skuld / Debt** | | |
| | Skuld í sambandi við beinleiðis trygging / Debt related to reinsurance | 1.265 | 1.289 |
| | Skuld í sambandi við endurtrygging / Debt related to reinsurance | 2.418 | 0 |
| | Skuld til atknýtt virkir / Commitments to related parties | 2.170 | 2.138 |
| | Beinleiðis skattur / Tax | 3.428 | 454 |
| | Onnur skuld / Other payables | 3.805 | 3.649 |
| | **Skuld í alt/ Total debt** | **13.085** | **7.529** |
| | **Tíðaravmarkingar / Accruals and deferred income** | **143** | **225** |
| | **Skyldur í alt / Total equity and liabilities** | **232.643** | **199.920** |

1 Nýttur roknskaparháttur / Accounting Policies

TRYGD

## Uppgerð av broyting í eginogn / Statement of changes in equity

| Uppgerð av eginogn / Statement of changes in equity | Partapeningur / Share capital | Uppskrivingargrunnur / Revaluation | Flutt úrslit / Retained earnings | Uppskot til vinningsbýti / Proposed dividends | Eginogn / Equity |
|---|---|---|---|---|---|
| **Eginogn 1. januar 2022 /** Shareholders'equity at January 1, 2022 | 40.000 | 615 | 15.188 | 0 | 55.803 |
| **Ársúrslit /** Net profit | 0 | 0 | 10.952 | 1.500 | 12.452 |
| **Eginogn 31. desember 2022 / Shareholders'equity at December 31, 2022** | **40.000** | **615** | **26.140** | **1.500** | **68.255** |
| **Eginogn 1. januar 2023 /** Shareholders'equity at January 1, 2023 | 40.000 | 615 | 26.140 | 1.500 | 68.255 |
| **Útgoldið vinningsbýtið /** Payed dividend | 0 | 0 | 0 | -1.500 | -1.500 |
| **Hálvársúrslit /** Net profit for the period | 0 | 0 | 4.569 | 0 | 4.569 |
| **Eginogn 30. juni 2023 / Shareholders'equity at Juni 30, 2023** | **40.000** | **615** | **30.710** | **0** | **71.325** |

TRYGD

# Notur / Notes

## Nota 1: Nýttur roknskaparháttur

Roknskapurin er gjørdur sambært kunngerð nr. 4 frá 27. juni 2018 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum. Nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til ársroknskapin fyri 2022. Víst verður tí eisini til brotið um nýttan roknskaparhátt í ársroknskapi felagsins fyri 2022.

## Grannskoðan og gjøgnumgongd

Hálvársfrásøgnin er ikki grannskoðað ella gjøgnumgingin.

## Note 1: Basis of preparation of the H1 financial statements

The interim financial statements have been prepared in accordance with Executive Order No. 4 from 27th of June 2018 on financial reports presented by insurance companies and holding companies. The accounting policies are unchanged with respect to the Annual Report for 2022. For reference see also the section with Accounting Policies in the 2022 Annual Report.

## Audit and review

No audit or review has been done to this interim report by internal or external auditors.

TRYGD

## Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðkent hálvársfrásøgnina fyri fyrra hálvár 2023 hjá Trygd P/F.

Hálvársfrásøgnin er gjørd í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Vit meta, at hálvársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum, fíggjarstøðuni tann 30. juni 2023 og úrslitinum av virkseminum hjá felagnum fyri tíðarskeiðið 1. januar 2023 til 30. juni 2023.

Okkara fatan er, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um gongdina í P/F Trygd, fíggjarligu støðuna umframt eina lýsing av týdningarmestu óvissunum, sum kunnu fara at ávirka felagið.

Tórshavn, 25. august 2023

## Statement by the management

The Board of Directors and the Management Board have today reviewed and approved the interim report of P/F Trygd for the six months ended 30 June 2023.

The interim financial statements have been prepared in accordance the regulatory requirements and possible requirements from Trygd's Articles of Association or contracts.

In our opinion, the management's report includes a true and fair view of the company's assets and liabilities, and the balance sheet at 30 June 2023 and of the result of the company's operations for the period 01 January 2023 to 30 June 2023.

We consider the management's report to give a fair representation of the development of Trygd P/F and describes significant risks and elements of uncertainty that it faces.

Tórshavn, 25 August 2023

**Stjórn / Executive Board**

Anna Mohr Holm

**Nevnd / Board of Directors**

| | | |
|---|---|---|
| Turið F. Arge<br>*Formaður / Chairman* | Jákup Arnhold Olsen | Christian Clemmensen |